

*Mathew Street, har Cavern liggur*

*Framhald av síðu 17*

## Liverpool og Beatles

At fundast í dagavís er strævið og ein dag tóku Jóannes, og skrivarin Jens Johan Dam, sær frí og fóru at vitja í Liverpool. Ein bý, sum eisini nógvir føroyingar kenna og hava havt samband við.

– Liverpool er arbeiðarabýur og spennandi og søguríkur býur. Eitt ávíst samband hevur altíð verið millum arbeiðarar og javnaðaráhugað fólk. Hóast arbeiðarabýur, so hevur býurin megnað at gera seg kendan og at skapa kend nøvn, t.d. The Beatles, sigur Jóannes Eidesgaard, sum vitjaði støð í samband við teir fýra kendu, The Fab Four.

– Beatlarnir vóru jú ungir menn, sum gjørdu uppreistur ímóti tí etableraða samfelagnum, teir gjørdu eina musikalska kollvelting, og broyttu heimin, og alt hetta er sprottið úr arbeiðaraklassanum og smáum korum, sigur Jóannes, sum eisini vitjaði í Mathew Street, har The Cavern Club liggur, har Beatles byrjaði at spæla.

– Brian Epstein, sum var kendur handilsmaður og hann, ið førdi The Beatles fram, var og vitjaði í Cavern tá Beatles spældu, tí hann hevði hoyrt um teir. Men hann segði seinni, at hann beinanvegin kendi, at hann líkasum ikki hoyrdi til í umhvørvinum, sigur Jóannes, sum eisini vitjaði Beatles savnið og sum fekk eina stóra heildarupplivirg, hóast t.d. Cavern Club í dag er stásaður nakað upp, í mun til fyrst í sekstiárunum, tá søga varð skrivað har.

– At vitja alt hetta var eitt stórt upplivilsi, serliga hjá mær, tá eg nú minnist sekstiárini og alt, ið tá hendi, sigur Jóannes.

Og sjálvandi varð eisini vitjað á Anfield Road -vøllinum hjá Liverpool.

– Her er tekin um tað sama, um nakað stórt, ið spratt úr smáum korum. Felagið er annars stovnað í 1892, eins og TB. Liverpool hevur verið millum mest vinnandi liðini. Og eyðkent er samanhaldið, og sum kunnugt gevur tað styrki, tá so nógv fólk eru saman um okkurt ávíst, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Stór uppboðssøla

Vitjað varð eisini í Peterhead. Har hava umboð úr vinnunevndini eisini vitjað.

Í Peterhead er stór gólvuppboðssøla. Tann dagin Jóannes Eidesgaard vitjaði, vórðu 4000 kassar seldir og sum heild eru nøgdirnar stórar.

– Tað er eitt serstakt umhvørvi, har er róp og hurlivas, og teir nýta blunk, keipur og andlitsbrá og annað slíkt, tá keypt verður, so tað eitt upplivilsi, greiðir Jóannes frá.

– Men onglendingar hava jú traditiónir. T.d. er tað so, at hann, ið keypur nakrar kassar, leggur altíð fleiri merkiseðlar á. Hetta stavar frá gomlum døgum, tá nógvur gjøgnumtrekur var í høllini, og seðlarnir lættliga fuku burtur. Í dag eru øðrvísi umstøður, men henda siðvenja við mongum seðlum er eftir enn, sigur Jóannes.

– Skelkandi var annars at síggja, hvussu smá hýsa var seld har. Hjá okkum høvdu menn helst blaka útaftur, men myndugleikarnir hava einki veruligt eftirlit, sigur Jóannes Eidesgaard, sum tó nevnir aðra áhugaverda skipan.

– Men teir seta dygdina høgt. Reiðarar og myndugleikar hava avtalu, har eftirlit kemur umborð á skipini. Hetta eru fólk, ið hava skil uppá fiskiskap og umstøður. Arbeiðsgongdirnar verða gingnar ígjøgnum saman við skiparanum og uppskot gjørt til bøtandi tiltøk. Frágreiðing verður skrivað, men hetta er innanhýsis og als ikki er talan um nakran peikifingur, men um samstarv og álit. Og hetta hevur givið góð úrslit, sigur Jóannes, og leggur afturat, at slík skipan møguliga er verd at umhugsa.

Byrjað verður árla á morgni við uppboðssøluni og um eitt tíðina er liðugt. Talan er um heilt aðrar nøgdir, enn vit kenna hjá okkum, men Jóannes heldur, at hetta við at byrja á morgni kanska er nakað, ið vit áttu at lagt okkum aftur.

Vitjað varð síðani á Robert Gordon, ið er lærdur háskúli. Hesin er frammaliga. Krit og talva eru fortíð og teldan verður nýtt, eisini til fyrilestrar, tá varpað verður á veggin frá teldúni við Power Point. Fjarlesandi hava atgongd til tilfarið, sum eisini ert tókt á alnetinum. Vert er at nevna, at Føroya Handilsskúli hevur samstarv við henda lærda háskúlan og 8 føroyingar lesa í løtui Master of Business sum fjarlestur. Hetta er fíggjað av BP.

Samanumtikið var hetta áhugaverd og gevandi vitjan.



*Cavern, har Beatles leiktu. Serliga verður gjørt burturúr John Lennon. - Hjá mær, sum minnist sekstiárini, var eit upplivilsi at síggja og uppliva Liverpool, sigur Jóannes Eidesgaard*



*Jóannes Eidesgaard og Tony Blair*



*Jóannes Eidesgaard og Robin Cook*



*Jóannes Eidesgaard og Jack Straw*



## Rembingar og politiska framtíðin

Hóast stutta ferð, so er almikið at siga frá, men vit fara at snúgva okkum aftur á politiska pallin.

Tað er eingin loyna, at vit liva í politiskum rembingartíðum og eisini innanflokka merkist hetta. Eisini hjá Labour og øðrum arbeiðaraflokkum. Hvat er alment og hvat er privat? Hesi mørk tykjast meira liðilig í dag, enn áður.

Og røðan hjá Tony Blair á landsfundinum var ein røða, har hann skuldi staðfesta sína leiðslu og binda saman ymsu sjónarhornini í flokkinum. Og so snildisliga talaði hann, at eftir lokna talu var eingin ivi og fagnaðurin var stórur fyri tí sigrandi Blair.

Uppá fyrispurning um, hvat slík ferð til Onglands kann geva í framtíðini, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Eg vænti økt samstarv millum londini. Koma vit so langt, at vit framleiða olju, so er samstarv upplagt. Men eisini innan fiskivinnu og umhvørvi er møguleiki fyri samstarvi. Og eisini innan samferðslu. Vit hava jú havt ferjusamband handa vegin og Atlantic Airways hevur samband nú, eins og ein nýggj Norrøna brátt kemur í sigling, so tað er avgjørt áhugavert at hava samband handavegin, metir Jóannes Eidesgard.

– Vit hava samband við Danmark, sum vit jú eru í ríkisfelagsskapi við. Handilssambond standa okkum frí og verður t.d. hugsað um ferðavinnu, so er gott at hava samstarv við tjóð, ið telur 60 milliónir fólk, og heldur ikki er teinurin millum londini so langur, sigur Jóannes.



*Formaður og floksskrivari við leiðsluni á á Robert Gordon, ið er framkomin lærdur háskúli, sum føroyingar samstarva við*

## Politiska smiðan

Ongland er ein gluggi út í heim. Teir eru við til at seta dagskránna á altjóða politiska pallinum og eyðmerkja framtíðar politikkin. Vit kunnu samanbera landsfundin hjá Labour við eina smiðu, har hugsanir taka form, sum vit hitta aftur seinni, hjá okkum kanska um eini 5 til 10 ár, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Labour fundurin er stórur og fólk koma úr øllum heiminum, men tó var heldur veik norðurlendsk umboðan, eg hitti ella sá so ongan annan úr nøkrum norðurlandi. Eisini gomlu hjálondini eru við og ymsar rørslur úr Afrika, so talan er um eitt livandi forum, greiðir Jóannes Eidesgaard frá.

Men hvussu stendur føroyski Javnaðarflokkurin í mun til tær rembingar í eru, eitt nú í spurninginum um alment og privat?

– Javnaðarflokkar kring okkum hava tikið stig í liberala ætt og tosa um privatisering og útlisitering. Vit hava kanska verið heldur afturhaldandi, men framvegis er privatisering ikki eitt mál í sær sjálvum, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Men tað er gott at koma á tal við onnur og at tosa um tingini, tí so torur ein eisini betri og vi skulu ikki hava tabu-evnir. Vit eiga ikki at seta føtur í spenni og siga nei til alt. Gott er at fáa íblástur, sigur Jóannes.

– Taka vit heilsuverkið, so er Ongland í ávísan mun farið at hallað mótvegis Amerika, men teir varðveita tó eitt alment heilsuverk. Men tað kann tó gerast betri, um tilgongd er av pengum til gransking og annað frá grunnum og vinnulívi. Tó er ikki talan um brúkaragjald, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Í síni tíð tók Thatcher nøkur arbeiðaramál til sín og fekk miðuna í politikkinum við. Blair ger kanska tað sama, førur konservativan politikk og fær fleiri við, hann avvápnar teir konservativu og varðveitur stjórnarvaldið, hugleiðir Jóannes Eidesgaard.

– Tað sama hendir her, sum aðrastaðni, og vit hava viðurkent tað, ið rørist her, sigur formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgarrd, efti vitjan í politisku smiðuni, har altjóða hugsanir og politikkur taka form, ið vit hitta ár seinni og skulu taka støðu til.



*Shankly, ein kendur maður í Liverpool og nógv avhildin. Sagt verður: He made people happy!*


**Snikkari**

Vit sóknast eftir snikkara at byrja skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv í eini vinnu, sum er í vøkstri.
- tryggar arbeiðsumstøður
- góða løn

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert ágritin
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álitandi

**Løn:**
Løn verður sambært nærri avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Dánjal Paula Poulsen, tel. 21 27 89

**Vatnsoyra** Snikkaravirki p/f.

FO-385 Vatnsoyrar · Telefon 33 21 77 · Fax. 33 31 66
E-mail: vs-fg@h-window.fo · Homepage: www.h-window.fo